# Blaðteknarar á G!

**Donsku blaðteknararnir Bob Katze Nelson og Lars Andersen gjørdust so bergtiknir av føroysku náttúruni og fólkinum, tá teir vitjaðu Føroyar í sambandi við framsýngina Blaðtekning & Fólkaræðið, ið var í Norðurlandahúsinum í vár, at teir valdu at halda summarfrítíðina í Føroyum saman við familjuni sínum. Í vikuskiftinum vitjaðu teir G!Festivalin. Tá Teitur fór á pallin funnu teir blokkin fram. Teir valdu at lýsa framførsluna hjá okkara fremsta tónleikara við hesum strikum, ið vit í dag prenta.**









